ÚT AT KOYRA

# Nýtt ættarlið frá Goodyear

**Fyrimyndin hjá øllum nýggjari sportdekkum, Goodyear Eagle F1, er komið á marknaðin í nýggjari útgávu**

DEKK
*Eirikur Lindenskov*

Goodyear kom á marknaðin við tí fyrsta Eagle F1 dekkinum í 1996. Hetta dekkið varð kent fyri tað serliga mynstrið, sum gjørdist fyrimyndin hjá øðrum dekkframleiðarum – og sum fyrimynd serliga fyri sportdekkini.

Nú er Goodyear komið við næsta ættarliðnum í F1 røðini.

Tað eru ikki øll, sum geva sær far um dekkini, ið sita undir bilinum. Nógv síggja tey bara sum okkurt svart og runt, sum bara skal vera har. Men tey hava altso størri týdning enn so – og tað er rættuliga umráðandi fyri koyritrygdina, at dekkini eru so góð sum gjørligt.

Men framleiðararnir av nýggja dekkinum hava eisini eina aðra filosofi, og teir hava gjørt dekkið m. a. við tí fyri eyga, at dekkið eisini »skal síggja gott út«, og tað var tí, at dekkið tók kappingarneytarnir á bóli í 1996.

## Roynt dekkið á Jyllandsringinum

Sosialurin var við á Jyllandsringinum í Silkeborg í Danmark, tá Goodyear dekkumboð í øllum ríkinum sluppu at royna nýggja dekkið – við fullum útblástri á kendu royndarbreytini hjá FDM.

Umframt at koyra við nógvari ferð, fingu vit eisini høvi at royna, hvussu gott vegtak, dekkið hevur, tá vit við nógvari ferð skuldu stýra millum forðingar.

Í fystu syftu hevur tú hug at halda á bremsuni, men so hvørt, sum álitið á vegtakið veksur, torir tú at lata speedara og róðrið klára paragraffirnar. Bara við at snara róðrinum, tá tú skalt – og stóla fult og heilt upp á dekkini, so fært tú roynt vegtakið fult og heilt til ytsta mark.

Nú er at siga, at talan ikki var um nakra testkoyring, men hetta var ein einvís framsýning hjá Goodyear, og tí ber ikki til at bera dekkið saman við nøkrum øðrum dekki, men kortini fekst ein góð fatan av, hvussu ómetaligan týdning eitt gott vegtak hevur – hvussu góð friktiónin er.

## Góða umtalu í bilbløðum

Men í bilbløðum ber til at lesa um umfatandi testkoyringinar, sum nógvir biljournalistar vóru til í Fraklandi fyrr í ár. Har fekk dekkið sera góða umrøðu. Í Bilmagasinet skrivaði Kurt Ellegaard, at nýggja F1 dekkið var betrað m. a. á hesum økjum:

- Styttri bremsutíð á vátum veg
- Betri vegtak á regnvátum veg í slalomkoyring
- Betri stýrieginleikar á turrum asfalti



*Á Jyllandsringinum bar til at royna dekkini til ytstu mørk, tá koyrt varð við nógvari ferð millum forðingarnar*

## Størri kontaktflatu

Fulla navnið hjá nýggja dekkinum er Eagle F1 GS-D3. Tað líkist nógv tí fyrra dekkinum, F1 GS-D2 í fyrstu syftu, men kortini eru broytingar í mynstrinum.

V-mynstrið er vorðið longri og smalari og byrjar í miðjuni. Hetta hevur víst seg at geva serliga góðar eginleikar á vátum veg. Dekkið hevur eisini størri kontaktflatu undir øllum koyriumstøðum enn fyrra dekkið vegna uppbyggingina, sum verður nevnd OneTred-tøkni, og serliga fína mynstrið er samstundis vorðið viðvirkandi til, at óljóðstøðið er minkað. Luftin verður lættari trýst út úr mynstrinum enn í fyrra dekkinum. Um samtrýsta luftin ikki natúrliga sleppur burt, verður meira óljóð.



*Fríðrikur Bláhamar, stjóri á Super Dekk, kannar nýggju F1 dekkini frá Goodyear, sum vórðu roynd á Jyllandsringinum í marsmánaði. Hann hevur fingið fyrstu sendingina heim*

## Vunnið 368 Formel 1 kappingar

Tað er ikki av ongum, at Goodyear hevur valt at kalla nýggja dekkið F1. Goodyear hevur vunnið flest Formel 1 kappingar í søguni, 368 í tali í tey 34 árini, Goodyear hevur luttikið, eins og 25 HM heiti og 26 konstruktørmeistaraheiti. Og nýggja dekkið hevur ikki heilt einki við Formel dekkini at gera: Tað líkist í uppbygging og evnavali teimum konstruktiónum, sum Goodyear nýtir í Racing-deildini – ella við royndum frá Formel 1 bananum. Júst hvør tann blandingurin er, upplýsir Goodyear ikki fjølmiðlum og tíðansheldur kappingarneytum.

Tað eru kortini ikki bara fólk við fínum sportbilum, sum leggja dent á at hava røttu og smartastu dekkini. Sambært hagtølum var sølan av dekkum í F1 bólkinum 7,45 milliónir dekk í 1997 í Evropa. – árið eftir, at F1 kom á marknaðin. Næsta ár verður væntað, at sølan fer at liggja um 18 millónir dekk í sama dekkbólki. Altso samlaða sølan av øllum dekkmerkjunum, vísa marknaðarkanningar, sum Goodyear hevur latið gjørt.



*Jyllandsringurin var kamur um framsýningina hjá Goodyear, tá nýggja dekkið var víst fram*

## Goodyear í meira enn 100 ár

FAKTA UM GOODYEAR

Fyritøkuna »The Goodyear Tire and Rubber Company« stovnaðu brøðurnir Frank og Charles Seiberling í 1898.

Hetta var júst um tað mundið, tá bilarnir gjørdust vanlig sjon á amerikonsku vegunum – og teir satsaðu upp á henda nýggja og vaksandi marknaðin. Tað var tann 29. august í 1898, at verksmiðjan formliga varð sett á stovn, og varð hon nevnd eftir pionerinum innan gummiframleiðslu, Charles Goodyear. Framleiðslan fór í gongd tann 21. november sama ár.

Hetta hendi 38 ár eftir deyða Charles Goodyear, ið uppfann vulkaniseringina, og alt lívið var hann sera hugtikin av øllum, ið hevði við gummi at gera. Goodyear fyritøkan fekk fastatøkur í Danmark longu í 1925, og var hetta í sambandi við, at Goodyear lat dekk til amerikonsku Ford og GM verksmiðjurnar, sum fram til sekstiárini høvdu deildir í Danmark, har bilar vórðu settir saman.

Goodyear dekkini komu tíðliga til Føroya, og var tað Vilhelm Nielsen, sum umboðaði tey saman við GM-bilunum. Í dag er Super Dekk umboð fyri Goodyear í Føroyum.



FÓTBÓLTSBLAÐIÐ 2002




Fæst kring alt landið frá fríggjadegnum 19. apríl

Sosialurin

Sosialurin í Sosialurin

Ábyrgdar starvsfólk
til Hornið í SMS

Hornið í SMS sóknast eftir starvsfólki at byrja skjótast tilber.

Arbeiðstíðin er sett til 30-35 tímar um vikuna í dagtímunum, har uppgávan verður at hava ábyrgdina á ávísum økjum, søla og uppfylging.

Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi og ábyrgdarfult starv við møguleikum til eitt fulltíðarstarv. Løn sambært galdandi sáttmála.

Umsóknir skulu sendast til Hornið innan 6. mai 2002.
Nærri fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við Jan Djurholm.

HORNIÐ
Hornið • Postboks 1069 • 110 Tórshavn • Tel 31 50 10

Kvinnuval



Annika Olsen
valevni í Suðursteymi

X við Fólkaflokkin